


## Keðiligar páskir í Frem

Tað gongur rættiliga illa hjá BK Frem í næstbestu donsku deildini, har føroyingarnir Bogi Løkin, Jónas Tór Næs og Andreas Lava Olsen spæla. Liðið spældi bæði skírisdag og 2. páskadag og í báðum fyrunum gjørdist talan um 4-2 tap. Fyrra dystin, sum var í móti AB, byrjaðu bæði Jónas Tór Næs og Bogi Løkin inni, meðan Bogi Løkin var tann einasti føroyingurin á vøllinum, tá hann byrjaði inni í dystinum móti Lyngby. Tá sat Jónas á beinkinum allan dystin, samstundis sum Andreas Lava Olsen framvegis er plágaður av skaða. Frem liggur í løtuni næstniðast í næstbestu donsku deildini við 12 stigum. Tað sama hevur Kolding, sum tó hevur betri málúrtøku, meðan tað eru fýra stig upp um niðurflytingarmarkið.

# Hvør sítt brotsspark og stig

**VODAFONEDEILDIN** Runavíkingar kenna seg ógvuliga snýttar, meðan suðuroyingar takka fyri hvønn møguleika og hvørt stig, teir kunnu fáa

Rólant Waag Dam

| | |
|---|---|
| FC Suðuroy | 1 |
| NSÍ | 1 |




*Vágbingar kundu fegnast í gjár, tá hesa ferð eydnaðist teimum at fáa mál í evstu løtu*

*Mynd: Heðin Weihe*

Christian Høgni Jacobsen var ivaleysur frá brotssparksblettinum og legði NSÍ á odda í fyrra hálvleiki, og tað sama var Jón Krosslá Poulsen, tá hann fekk møguleikan frá sama bletti langt inni í yvirtíðini.

Sostatt endaði dysturin við stigabýti, sum heimaliðið hóast alt má vera fegnast um.

Samstundis eru runavíkingar ikki blíðir. Spurdur, um teir ikki áttu at vunnið á uppflytarunum, svarar venjarin Pauli Poulsen bersøgið, at teir hildu seg hava vunnið dystin, tá vanliga leiktíðin og teir fýra minuttirnir, dómarin hevði lagt aftrat, vóru farnir.

– Men seks ella sjey minuttir inni í yvirtíðini fáa teir eitt brotsspark, so vit føla okkum snýttar, sigur venjarin hjá NSÍ.

Meðan runavíkingar halda, at sigurin varð stolin frá teimum, so kenna teir í FC Suðuroy seg rímiliga hepnar. Hetta, tí teir – í mun til fyrsta umfar – fingu stig í síðstu løtu, heldur enn at missa, sigur Palli Augustinussen, liðformaður hjá FC Suðuroy.

– Í samband við sjálva brotssparksstøðuna, so sá eg ikki hvat hendi, tí har var so nógv fólk fyri. Men dómarin sá okkurt og bríkslaði sjálvandi, sigur Palli Augustinussen.

### Lítið undirhald

Sostatt vóru tað tveir deyðbóltar, sum avgjørdu dystin í Vági í gjár. Hetta var kanska heldur ikki heilt óvæntað, tí nógvi vindurin tarnaði spælinum nakað, samstundis sum vindurin ofta kann arga og yvirraska við deyðbóltsstøður.

Veðrið setti eisini sín dám á spælið, sum ikki var nakað at rópa hurrá fyri. NSÍ vísti seg tó kortini sum eitt hampiliga væl skipað lið í fyrra hálvleiki, men beinleiðis undirhaldandi var tað ikki at síggja.

Suðuroyingar hava eisini víst betri spæl í bestu føroysku fótbóltsdeildini enn tað, teir vístu í gjár. Hinvegin eru teir ikki komnir í deildina fyri at undirhalda, men fyri at yvirliva. »So far, so good«, siga teir.

*rolant@sosialurin.fo*



# Undarlig byrjan

**VODAFONEDEILDIN** Liðformaðurin hjá FC Suðuroy hevði ikki ímyndað sær, at hansara lið skuldi fáa tvey stig burtur úr teimum báðum fyrstu dystunum á henda hátt

Rólant Waag Dam

Palli Augustinussen er ikki bangin fyri at viðganga, at hann ikki hevði sæð sítt lið leggja soleiðis fyri í bestu føroysku fótbóltsdeildini hetta kappingarárið.

– Móti HB roknaðu vit ikki við einum sigri, men føldu kortini, at vit mistu hann í evstu løtu og vóru vónbrotnir. Á heimavølli fara vit sum oftast eftir øllum, men tá vit skoraðu so seint ímóti NSÍ, kendu vit okkum hepnar, flennir liðformaðurin.

Hóast merkisverdu byrjanina, so eru teir kortini væl nøgdir í Suðuroynni. Ikki minst, tí at stigini eru fingin til hølvdar, hóast liðið ikki hevur allar mans tøkar.

– Vit mangla framvegis tveir útlendingar, sum vónandi koma at styrkja liðið uppaftur meira, sigur Palli Augustinussen.

*rolant@sosialurin.fo*